# Krabbagágga

**Hóast summarferian er av, kanst tú framvegis taka tær av løttum og skemta tær í fríkorterinum. Og við krabbagágguni hjá STROK verður skúlabyrjanin í hvussu er stuttligari ☺**

*Vit hava eisini lagt krabbagágguna sum pdf á strok.fo, so um tú ikki vilt klippa í blaðið, kanst tú taka fíluna niður og printa hana út ☺*

STROK

**GAMAN**

**Uppgáva:** *Sig eina skemtisøgu fyri læraranum. Fá hann at flenna.*

GAMAN

**HURL UM BURL**

**Uppgáva:** *Fá minst fimm persónar at lata seg úr skónum og fylgja tær runt í skúlagarðinum á eina skóleysa skattaveiðu.*

HURL UM BURL

STROK

**EG OG MÍTT KELIDÝR**

**Uppgáva:** *Gakk sum eitt firbein tvørtur um skúlagarðin. Tað er ikki loyvt at hvíla!*

EG OG MÍTT KELIDÝR

☺ Tú sleppur at kitla ein vin restina av fríkorterinum.

☺ Ein vinur sleppur at kitla teg restina av fríkorterinum.

☺ Spæl tú ert ein pytonslanga og klemma øll, sum ganga framvið.

☺ Statt á øllum fýra og skjótt ryggin upp sum ein ketta. Mjavva eftir øllum, sum koma framvið.

☺ Baka bollar at bjóða vinfólkunum dagin eftir.

☺ Gakk skóleys/ur restina av degnum. Spyr nakar hví, svara so, at tú ert ein hoppi á drekaveiðu.

☺ Tak í hondina á skúlastjóranum.

☺ Snakka sum Bubu restina av degnum.

**FLÓVISLIGT**

**Uppgáva:** *Ger eitt diskotek í fríkorterinum. Fá størsta drongin í flokkinum at dansa við tær afturvið sanginum hjá Bubu, „Eg havi eina hond".*

FLÓVISLIGT

**PRÁT**

**Uppgáva:** *Les eina síðu hart úr næstu bók, meðan tú gapar stórt.*

PRÁT

☺ Vinur tín skal bera taskuna hjá tær restina av degnum og spíska allar tínar blýantar.

☺ Tú skalt svara øllum spurningum í flokshølinum restina av degnum – uttan mun til um tær dámar teir ella ei.

☺ Tú sleppur at gera av, hvønn tónleik tú og vinur tín skulu lurta eftir í fríkorterinum restina av vikuni.

☺ Statt úti í skúlagarðinum og syng hart, til tú dugir allan tekstin til sangin uttanat.

☺ Skriva eitt anonymt kærleiksbræv til tann, sum tú ert forelskað/ur í. Legg tað í jakkalumman hjá viðkomandi.

☺ Skriva eitt kærleiksbræv til tann, sum tú er forelskað/ur í og skriva títt navn undir. Legg tað í jakkalumman hjá viðkomandi.

☺ Vinur tín skal bera teg halakukk í øllum fríkorterinum.

☺ Lán handklæði frá onkrum aftaná, at persónurin hevur brúkt tað. Sig, at tú hevur gloymt títt.

**LOYNILIGT**

**Uppgáva:** *Fortel 10 ting um teg sjálvan, sum vinur tín ikki veit. Tú hevur eitt minutt.*

LOYNILIGT

STROK

**UMMÆLI**

**Uppgáva:** *Syng alt niðurlagið í sanginum hjá Danny & The Veetos „Sunnuhvøld í mai" uttan, at tað ljóðar ræðuligt. Tann, sum heldur í krabbagágguni, er dómari.*

UMMÆLI

**ÍTRÓTTUR**

**Uppgáva:** *Být um fimleikaklæðir við ein vin til næsta fimleikartíma. Vinurin skal vera minni enn tú.*

ÍTRÓTTUR

STROK